# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Birgir Enghamar 50 ár



Mikudagin 8. desember fyllir Birgir Enghamar, bilførari og formaður í HB, 50 ár.

Birgir er føddur í Klaksvík 8. desember 1954. Í 1956 flutti hann saman við foreldrunum, Jastrid og Jørgen Enghamar (1928-74), sum tá høvdu búð í Klaksvík í tvey ár, til Havnar at búgva.

Birgir var sjómaður og sigldi í mong ár. Frá 1978-80 búði hann í Vági.

Seinnu mongu árini hevur hann koyrt sum hýruvognsførari í Havn, fyrst á bilstøðini Bil og síðan 1988 í Auto. Hann var formaður í Akstursvinnufelagnum Samfylking í nøkur ár.

Í desember 1999 kom Birgir í nevndina hjá fótbóltsfelagnum HB, og síðan 2001 hevur hann verið formaður í felagnum.

Hann er sera nærlagdur í sínum arbeiði, og í sínum arbeiði í HB hevur hann brúkt nógva tíð seinnu árini, og væl hevur hildnast. Av fýra árum sum formaður, hevur besta liðið hjá felagnum verið FM-vinnari tey trý.

Birgir er framvegis virkin sum fótbóltsleikari, og hevur seinastu árini spælt við 5. deild hjá HB. Her er tað eisini blivið til nøkur heiðursmerki, og okkurt av teimum er úr gulli.

Hann spælir eisini innandura fótbólt, minst 2-3 ferðir um vikuna, saman við vinmonnunum, og um summarið er hann fastur fúsur í »Lunch United«. So hóast aldurin, so manglar viljin ikki.

Birgir er sera hugnaligur at vera saman við, altíð við tí skemtiligi, men skal tað vera álvarsamt, so liggur hansara partur ikki eftir.

Í enskum fótbólti er hann íðin Manchester United viðhaldsmaður.

Børnini eru: Virgar, 26 ár, Jørgen, 24 ár, Leila, 20 ár, og Allan, 18 ár.

Opið hús verður í HB-húsinum mikudagin frá Kl. 10-14.

---

Hotel Hafnia:

## Tryggir við nýggju eigararnar

**Eftir 1. januar 2005 verður eingin av Restorff familjuni á Hotel Hafnia, men hotellið verður rikið í sama anda sum higartil, og starvsfólkini vera tey somu, sigur Martin Restorff, stjóri á hotellinum**

HOTELSØLA

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Partaeigararnir á Hotel Hafnia, Johan M. Restorff, MC Restorff og Martin Restorff, stjórin, siga allir, at teir kenna seg heilt tryggar við nýggju eigararnar av hotellinum.

Hotellið verður koyrt í sama anda sum higartil, og kundarnir koma ikki at merkja nakran mun.

Teir siga, at tað var eitt ynski frá nýggju eigarunum, at starvsfólkið skuldi halda áfram.

Einasti munur verður, at ongin av Restorff familjuni verður har eftir 1. januar 2005. Johan hevur verið í føstum starvi á hotellinum síðan 1960, MC síðan 1972 og Martin síðan 2002.

## Tøkk

Eina stóra tøkk senda vit øllum tykkum,
ið sýndu samkenslu, tá ið pápi okkara

**Dávur Isfeldt**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri troystandi orð, blómur, kransar,
heilsanir og gávur.
Somuleiðis takka vit tykkum øllum,
sum hjálptu til við jarðarferðini.

**Mortan og Maria**

# Minningarorð



Tað vóru sorgarboð, at fáa mánamorgunin, at Birgir Nónsgjógv var farin.

Ein av okkar allar størstu persónligheitum er ikki ímillum okkum meira, og henda sorg fer at merkja okkum í langa tíð frameftir.

Tað, at Birgir er farin, er ein stórur missur fyri alt landið.

Tey seinastu nógvu árini hevur Birgir mest sum einsamallur lyft ta tungu byrðu at menna føroyska saltfiskaframleiðslu, og hetta hevur ført við sær eina munandi betur góðsku á føroyskum saltfiski, enn tann hjá kappingarneytunum.

Birgir var ein óvanliga kreativur persónur, við sonnum listargávum innan fleiri øki. Sum maskinsmiðjur var hann ein sannur úrmælingur, og sum dømi kann nevnast at eitt tað fyrsta hann gjørdi, tá ein nýggj maskina kom á virkið var, at broyta hana til tað betra.

Fyri at menna sína saltfiskaframleiðslu, brúkti hann mest sum alla sína tíð at gera royndir, bæði tøkniliga og við síni vitan.

Úrslitið er, at arbeiðsfólkið á United Seafood á Toftum, klára at framleiða eina vøru til tann spanska marknaðin, sum er nógv tann besta á hesum saltfiska marknaði, yvirhøvur.

Vit, sum hava verið hansara føroysku kappingarneytar, hava roynt sum frægast at fylgt honum og hansara hugskotum, og hóast vit hava verið ljósár aftanfyri Birgir, so hevur hann drigið okkum, og Føroyar, fram um aðrar tjóðir, sum t.d. Ísland og Noreg.

Føroyingar hava sostatt notið gott av hansara vitan og treiskni, tá talan er um saltfisk. Hansara lívsverk, hevur givið føroyingum eina serstøðu á saltfiskamarknaðunum í Europa. Tað er hesum lívsverki at takka, at føroyski flotin í langa tíð hevur fingið hægsta toskaprís. Eisini hevur hetta lívsverki lakt lunnar undir tey nógvu arbeiðsplássini á United Seafood á Toftum.

Tá ið vit, kappingarneytar, ringdu til Birgir, at spyrja um eitthvørt, fekst altíð eitt erligt svar.

Hann kundi akkurát tað sama givið ein slutur fyri ein slatur, men soleiðis var Birgir ikki. Hann vildi øllum tað besta, og virðismettið øll líka. Hann sá ikki niður á nakran, tí fyri hann vóru øll menniskju eins.

Persónliga kendust vit væl, og tí sneiddi prátið okkara millum seg ofta um familjurnar. Og hann duldi ongantíð fyri, hvussu nógv Elisabeth, og tey 7 børnini høvdu at týða fyri seg. Birgir var familjumaður burturav.

Ómetaliga nógv fólk varð komi saman í Sjóvar kirkju at siga Birgiri farvæl eina seinastu ferð. Flestu okkara á vanliga stilla háttin, ímeðan onnur meira virkin, við vøkrum kórsangi, og vinunum Jónsveini og Arna á gittarum, og við songi. Prestur segði nøkur ógvuliga góð og hjartanemandi orð, sum lýstu Birgir sera beinrakið. Hetta, saman við at sonur hansara, Jógvan Páll, bert 18 ára gamal, so megnarliga tók orðið, og beyð pápa sínum eitt seinasta farvæl, fyri síðani at lovað, at teir einaferð skuldu síggjast aftur, á øðrum stað. Alt hetta setti myndina í perspektiv.

Tað oysti niður allan dagin, men tá fyrsta urguljóðið ljóðaði í kirkjuni, sleit í, og himmalin gjørdist klárur og bláur yvir Sjóvar kirkju – og bert yvir Sjóvar kirkju. Hugdi tú upp í loft, var tað kolgrátt allan sjónarringin uttan júst yvir kirkjuni, og hetta helt sær líka til seinasta sálm við grøvina. Hann dróg á luftina, og so fór aftur at regna.

Hetta er júst myndin eg siti eftir við av Birgiri sum menniskja, sum framleiðari, sum fosturlandsmanni, og sum føroyskari hetju.

Eg vóni at tú Elisabeth og børn, familja, vinir og arbeiðsfelagar, hóast sorg og sakn, finna ta styrki sum skal til, fyri aftur at hóma tað ljós, sum Birgir Nónsgjógv setti at lýsa.

**Heilsan**
**Rói Egholm**